# Lágargarði



*Borgarstjórin Heðin Mortensen ynskir Metu góða eydnu í nýggja starvinum*



*Marjun fekk mangt klemmið á møttøkuni*



*Fimm av syskjunum vórðu komin at heiðra systurina*

leikar hjá einstaklingum og familjum, og hjá allari hjá heimatænastuni, so eru nógvar aðrar stórar avbjóðingar fyri framman. Tað er ov nógv at koma inn uppá í hesum samanhangi í dag, men tær snúgva seg allar um at lyfta ta innihaldsligu dygdina í allari eldrarøktini. At vit nú skjótt fara at koma burtur úr neyðini við manglandi búplássum, fer tað eisini at frígeva orku, til tey dagligu tilboðini í eldrarøktini, og til eina starvsfólkaliga uppgradering av øllum viðurskiftum á røktarfakøkinum. Ikki minst fyri at kunna rekruttera tey nógvu starvsfólkini, sum vit fara at fáa brúk fyri aftrat hesi komandi árini.

Til síðst, aftur til tykkum báðar. Marjun, Lágargarður er bygdur upp í tínari tíð, takk fyri tín veldiga innsats. Tað eru nógv, eldri, avvarandi og onnur, harímillum eg sum landsstýrismaður á økinum, sum eru takksom fyri tey nógvu ár av tínum lívi, tú hevur halgað til at røkja hesa tænastu. Og eg vóni at nú tú gevst her, fer at fáa nógv góð ár til at tað, sum tú kann hugsa tær, men sum tú aldrin fekk stundir til meðan tú stóð fyri ábyrgdini við Lágargarði. Eg ynski tær bestu eydnu við tí.

Eisini vil eg ynskja Metu tillukku við hesum nýggja starvinum – Meta hevur góðar royndir á økinum, og eg ivist ikki í at tú eisini fer at verða ein góðu leiðari her á Lágargarði. Eg ynski tær allarbestu eydnu við tí segði landsstýrismaðurin.



*Fleiri av teimum nærmastu gjørdu løtuna hjá Metu hugnaliga*